# Klaksvíkar Býráð

**Dagfesting:** 28.05.2026 kl. 17:30
**Málnr.:** 24/01278 Gerðabók
Nevndarlimir: Karl Johansen, Annika S. Biskopstø, Signhild V. Johannesen, Hermann R. Samuelsen, Anfinn í Toft, Sylvia Thomsen, Jógvan Skorheim, Oddmar á Lakjuni, Eyðstein Ó. Poulsen, Fríðin Ziskason og Atli S. Justinussen
Varalimir:
Ikki møtt:
Onnur: Sonni Ó. Djurhuus, kommunustjóri
Protokollførari: Jensa Anthoniussen, journalfulltrúi

| **Málsyvirlit** | | |
|---|---|---|
| **Til viðgerðar** | | |
| 42/26 | 26/00620-1 | Roknskapur og grannskoðanarprotokoll 2025 - Klaksvíkar Býráð |
| 43/26 | 26/00051-5 | Ferðavinnuætlan - Ætlan til góðkenningar *Málið tikið av skrá* |
| 44/26 | 26/00589-1 | Avtala um samstarv um integratiónssamskipara fyri norðurøkið |
| 45/26 | 23/00827-17 | SíK3 – Fremjan av útbygging av stadion í Klaksvík – *eykajáttan, fyrra viðgerð* |
| 46/26 | 24/01314-34 | Varalimur í Ferðslunevndina |
| 47/26 | 26/00467-11 | Velja lim í arbeiðsbólk at arbeiða við endurskoðan av ferðslutrygdarætlan |
| 48/26 | 26/00532-3 | Umsókn um uppræ̈ttan av marki - matr.nr. 482 og 437ch |
| 49/26 | 26/00572-2 | Marknaumskipan millum matr.nr. 638 og 639 í Klaksvík |
| 50/26 | 24/00244-22 | Sundurbýti, marknaumskipan og byggisamtyktarbroyting í Ánunum - matr.nr. 33 og 28 |
| 51/26 | 26/00180-2 | Marknaumskipan, matr.nr. 11a og 11b á Trøllanesi |
| 52/26 | 24/00720-29 | Trafostøð - lendisspurningur |
| 53/26 | 24/00923-10 | Endurskoðan av byggisamtyktini fyri Syðradal og Húsar |
| 54/26 | 26/00411-2 | Uppískoytisstykki - matr.nr. 40, Svínoy - Búnaðarstovan |
| 55/26 | 26/00022-39 | Serflutningsskipanin – keyp av nýggjum bussi – *eykajáttan, fyrra viðgerð* |
| 56/26 | 26/00582-1 | Øktur tørvur á heimahjálp (NBH) - *eykajáttan (KK), fyrra viðgerð* |
| 57/26 | 26/00583-1 | Bólkaleiðarar til Norðoya Røktarheim (NBH) - *eykajáttan (KK), fyrra viðgerð* |
| 58/26 | 26/00584-1 | Fígging av felags dagtilhaldi á Glyvrum fyri demenssjúk (NBH) - *eykajáttan (KK), fyrra viðgerð* |

| | | |
|---|---|---|
| 59/26 | 26/00585-1 | Flutningur til felags dagtilhaldið á Glyvrum til yngri borgarar við demensi (NBH) - *eykajáttan (KK), fyrra viðgerð* |
| 60/26 | 26/00013-4 | Vegir, íløgur í 2026 - *eykajáttan, seinna viðgerð* |
| 61/26 | 26/00504-1 | Sprotin, nýtt rakstrarstað, útreiðsluneutral flyting millum kontur - *eykajáttan, seinna viðgerð* |

| **Til viðgerðar fyri afturlatnum hurðum** | | |
|---|---|---|
| 62/26 | 22/01821-40 | Uppsøgn av sáttmála |
| 63/26 | 25/01329-8 | Stuðul til verkætlan |
| 64/26 | 25/00750-29 | Útboð |
| 65/26 | 26/00452-4 | Víðarisøla |

**Til viðgerðar**

## 42/26
## 26/00620-1 Roknskapur og grannskoðanarprotokoll 2025 - Klaksvíkar Býráð

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 26.05.2026 | 46/26 |
| 2 Klaksvíkar Býráð | 28.05.2026 | 42/26 |

**26/00620-1 Roknskapur og grannskoðanarprotokoll 2025 - Klaksvíkar Býráð**

**Frágreiðing um málið:**
**Stutt um roknskapin**
Roknskapurin vísir 22 mió. kr. í avlopi áðrenn avdráttir.

Inntøkurnar eru 401,8 mió. kr., rakstur 306,2 mió. kr., íløgur 54,1 mió. kr., rentustuðul 6,8 mió. kr. og fíggjarpostar 12,4 mió. kr.

Áogn skuldarum 7,3 mió. kr., skattaeftirstøður 4,5 mió. kr., áogn hjá Gjaldstovuni 36,3 mió. kr., tíðaravmarkingar 0,6 mió. kr. Innistandandi 42,7 mió. kr.

Bankaskuldin er 413,1 mió. kr. móti 391,1 mió. kr. við ársbyrjan. Broytingin er netto 22 mió. kr. Í árinum er lán tikið upp á 40 mió. kr., og 18 mió. kr. eru goldnir í avdráttum.

Kreditorar 25,1 mió. kr. og onnur skuld 12 mió. kr.
Avseting til Landsverk ísbv. grót til Norðhavnina (6,3 mió kr) er íroknað teimum 12 mió. kr.

Nettoskuldin er 358 mió. kr., sum er 44 mió. kr. undir skuldarmarkinum.

**Burðardygd og heimsmálini:**
-

Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Føroyar . Tlf. 410000

**Lógargrundarlag:**
§ 46. Í samband við góðkenning av ársroknskapinum skal kommunustýrið taka støðu til, um grannskoðarin skal halda áfram, ella um ein annar skal veljast.

Stk. 2. Til tess at loysa grannskoðaran úr starvi krevst loyvi frá landsstýrismanninum.
§ 53, stk. 2, 1) roknskapurin skal verða landsstýrinum í hendi innan 1. juni eftir endað fíggjarár.

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Roknskapurin 22 mió. kr. í avlopi áðrenn avdráttir.
Bankaskuldin er 413,1 mió. kr.
Innistandandi 42,8 mió. kr. Hetta er tepurt, tá hugsað verður um leysaskuld (ognarar v.m.), og at peningarenslið er væl omanfyri 400 mió. kr.
Nettoskuldin er 44 mió. kr. undir eina álíkning

**Tilmæli:**
Mælt verður til, at fíggjarnevndin góðtekur uppskotini um roknskap og protokoll og beinir málið í býráðið við tilmæli um at góðkenna.
Val av grannskoðara.

Roknskapur og protokoll skulu undirskrivast á býráðsfundinum.

**Fíggjarnevndin 26. mai 2026:**
Nevndin góðtekur uppskotini um roknskap og protokoll og beinir málið í býráðið við tilmæli um at góðkenna.

**Klaksvíkar Býráð 28. mai 2026:**
Grannskoðaði ársroknskapurin fyri 2025 við tilhoyrandi grannskoðanarprotokoll einmælt góðkendur.
Harumframt einmælt samtykt at lata SPEKT halda fram sum grannskoðari kommununnar.

## 43/26
## 26/00051-5 Ferðavinnuætlan - Ætlan til góðkenningar

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 19.05.2026 | 29/26 |
| 2 Havna- og Vinnunevndin | 20.05.2026 | 33/26 |
| 3 Klaksvíkar Býráð | 28.05.2026 | 43/26 |
| 4 Mentanarnevndin | 16.06.2026 | |

**26/00051-5 Ferðavinnuætlan - Ætlan til góðkenningar**

**Frágreiðing um málið:**
Smb. løgtingslóg nr. 66 frá 30. mai 2024 er álagt kommununum at gera eina ferðavinnuætlan, og er nú 1. útkast til hesa ætlan lagt fyri nevndirnar til góðkenningar, áðrenn hon skal sendast til landstýrisfólkið til góðkenningar.

**Burðardygd og heimsmálini:**
Ein ferðavinnuætlan stuðlar serliga undir Heimsmál 8, 11, 12, 15 og 17 við at fremja burðardyggan búskaparvøkstur, tryggja javnvág í lokalsamfeløgum, verja náttúrutilfeingi og styrkja samstarv millum almennar og privatar partar.

**Lógargrundarlag:**
Løgtingslóg nr. 66 frá 30. mai 2024
Kommunufulltrúin

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Ítøkiligu fíggjarligu avleiðingarnar av hesum máli er ein árlig útreiðsla á 96.000,- kr.

**Tilmæli:**
Mælt verður til, at nevndin tekur undir við at góðkenna ferðavinnuætlanina

**Mentanarnevndin 19. mai 2026:**
Nevndin ynskir at fáa málið fyri aftur á komandi fundi.

**Havna- og Vinnunevndin 20. mai 2026:**
Nevndin beinir málið í býráðið.

**Klaksvíkar Býráð 28. mai 2026:**
Málið tikið av skrá.

## 44/26
## 26/00589-1 Avtala um samstarv um integratiónssamskipara fyri norðurøkið

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Trivnaðarnevndin Eldri og Bústaðir | 19.05.2026 | 26/26 |
| 2 Integratiónsnevndin | 20.05.2026 | 5/26 |
| 3 Fíggjarnevndin | 26.05.2026 | 56/26 |
| 4 Klaksvíkar Býráð | 28.05.2026 | 44/26 |

**26/00589-1 Avtala um samstarv um integratiónssamskipara fyri norðurøkið**

**Frágreiðing um málið:**
Vísandi til viðgerðirnar higartil av hesum máli, verður sjálvur samstarvssáttmálin við hesum lagdur fyri avvarðandi nevndir og býráðið til formliga samtykt.

**Lógargrundarlag:**
Løgtingslóg nr. 146 frá 20. desember 2024 um integratión:
*§ 4. Hvør kommuna skal í seinasta lagi 1. juli 2026 hava integratiónssamskipara.*
*Stk. 2. Kommunurnar kunnu samstarva við aðrar kommunur um integratión og integratiónssamskiparar.*
*Stk. 3. Landsstýrisfólkið kann í samráð við kommunurnar áseta nærri reglur um integratiónsøkið og kommunalar integratiónssamskiparar, herundir reglur um, hvat skal gerast, um kommunurnar ikki halda sínar skyldur sambært løgtingslógini.*

Fráboðan nr. 33 frá 13. apríl 2026 um býti av málsøkjum landsstýrisins millum landsstýrisfólkini:
*§ 21. Landsstýrisfólkið í vinnumálum umsitur ... integratiónsmál, ... .*

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Nóg mikið er sett av til útreiðslur kommununnar á hesum øki í 2026.

**Tilmæli:**
Vísandi til viðgerðirnar higartil av hesum máli, verður sjálvur samstarvssáttmálin við hesum lagdur fyri avvarðandi nevndir og býráðið til formliga samtykt.

**Trivnaðarnevndin Eldri og Bústaðir 19. mai 2026:**
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagfest 11-05-2026.

**Integratiónsnevndin 20. mai 2026:**
Nevndin tekur undir við E&B, dagf. 19-05-2026.

**Fíggjarnevndin 26. mai 2026:**
Nevndin tekur undir við E&B, dagf. 19-05-2026.

**Klaksvíkar Býráð 28. mai 2026:**
Einmælt samtykt at taka undir við Fíggjarnevndini 26. mai 2026 og formliga at samtykkja samstarvsavtaluna millum Eysturkommunu, Fuglafjarðar kommunu og kommunurnar í Norðoyggjum um integratiónssamskipara fyri norður-/eysturøkið.

## 45/26
## 23/00827-17 SíK3 – Fremjan av útbygging av stadion í Klaksvík – *eykajáttan, fyrra viðgerð*

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 19.05.2026 | 31/26 |
| 2 Fíggjarnevndin | 26.05.2026 | 49/26 |
| 3 Klaksvíkar Býráð | 28.05.2026 | 45/26 |
| 4 Klaksvíkar Býráð | 25.06.2026 | |

**23/00827-17 SíK3 – Fremjan av útbygging av stadion í Klaksvík - Eykajáttan 1**

**Frágreiðing um málið:**
Ísv. at arbeiðið við liðugtgerð av Hornaskýlinum hevur drigið út, og ymsar meirveitingar hava verið framdar, verður við hesum biðið um eykajáttan til hendan meirkostnað.
Meirveitingarnar tilsamans, íroknað el- og vvs-arbeiði, avrigging og liðugtgerð, verður samlað umleið 2,1 mió í ár.

**Burðardygd og heimsmálini:**
-

**Lógargrundarlag:**
Kommunufulltrúin

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Meirkostnaðurin er uml. 2,1 mió., sum má eykajáttast av *tøkum peningi*.

**Tilmæli:**
Mælt verður til, at nevndin tekur undir við eykajáttan á 2,1 mió. til meirkostnaðin í Hornaskýlinum

Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Føroyar . Tlf. 410000

**Mentanarnevndin 19. mai 2026:**
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 11-05-2026.

**Fíggjarnevndin 26. mai 2026:**
Nevndin tekur undir við MeN 19-05-2026.

**Klaksvíkar Býráð 28. mai 2026:**
*Jógvan Skorheim luttók ikki í viðgerðini av málinum vegna ógegni.*
Tilmælið frá Fíggjarnevndini 26. mai 2026 samtykt við 9 atkvøðum fyri (KHJ, HRS, AíT, SVJ, ST, OáL, EÓP, FZ og ASJ) og 1 blankari atkvøðu (ASB).

## 46/26
## 24/01314-34 Varalimur í Ferðslunevndina

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Klaksvíkar Býráð | 28.05.2026 | 46/26 |

**24/01314-34 Varalimur í Ferðslunevndina**

**Frágreiðing um málið:**
Í kommunustýrisskipanini stendur um Ferðslunevndina í § 41, 1. petti: *Ferðslunevndin, sum er ein faknevnd innan tekniska málsøkið, er mannað við trimum limum og verður vald á fyrsta býráðsfundi eftir hvørt býráðsval við einum umboð fyri býráðið (býráðslimur), einum umboð fyri teknisku umsiting og einum umboð fyri løgregluna.*

Siðvenja hevur ikki verið at velja varalim fyri kommunustýrislimin í nevndini. Men tað er viðhvørt avbjóðandi at avgreiða fundir, tí tað berst kommunustýrisliminum í nevndini frá at møta. At byrgja upp fyri hesum verður tí skotið upp, at býráðið velur ein varalim (kommunustýrislim) í nevndina.

**Lógargrundarlag:**
Kommunustýrisskipan fyri Klaksvíkar kommunu frá 29. jan. 2026, § 41, 1. petti.
Kommunustýrislógin, § 35: *Har kommunustýrið eftir øðrum reglum ella fyriskipanum skal vera umboðað í øðrum nevndum ella tilíkum, og kommunustýrið bert skal velja eitt umboð, fer valið fram eftir meirilutavalháttinum sambært § 2. ... .*

**Fíggjarligar avleiðingar:**
-

**Tilmæli:**
Mælt verður býráðnum til at velja ein varalim millum kommunustýrislimirnar í ferðslunevndina.

**Klaksvíkar Býráð 28. mai 2026:**
Einmælt samtykt at velja Karl H. Johansen, borgarstjóra, til varalim í ferðslunevndina.

Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Føroyar . Tlf. 410000

## 47/26
## 26/00467-11 Velja lim í arbeiðsbólk at arbeiða við endurskoðan av ferðslutrygdarætlan

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Klaksvíkar Býráð | 28.05.2026 | 47/26 |

**26/00467-11 Velja lim í arbeiðsbólk at arbeiða við endurskoðan av ferðslutrygdarætlan**

**Frágreiðing um málið:**
Í apríl nevndarumfarinum varð samtykt at fara í gongd við at endurskoða og dagføra ferðslutrygdarætlan kommununnar.

Í hesum sambandi varð eisini samtykt at seta arbeiðsbólk, mannaður við nevndarlimunum í ferðslunevndini, einum ella tveimum persónum frá teknisku fyrisiting og einum umboði fyri *býráðsminnilutan*.

**Tilmæli:**
Mælt verður til, at býráðs*minnilutin* velur umboð í arbeiðsbólkin.

**Klaksvíkar Býráð 28. mai 2026:**
Einmælt samtykt at taka undir við uppskotinum frá býráðsminnilutanum at velja Oddmar á Lakjuni í arbeiðsbólkin.

## 48/26
## 26/00532-3 Umsókn um upprættan av marki - matr.nr. 482 og 437ch

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin | 18.05.2026 | 64/26 |
| 2 Tekniska Nevnd | 20.05.2026 | 42/26 |
| 3 Fíggjarnevndin | 26.05.2026 | 60/26 |
| 4 Klaksvíkar Býráð | 28.05.2026 | 48/26 |

**26/00532-3 Umsókn um upprættan av marki - matr.nr. 482 og 437ch**

**Frágreiðing um málið:**
Eigarin av matr.nr. 482 søkir um loyvi at rætta markið upp millum ogn sína og kommunalu ognina, matr.nr 437ch. Upprættingin ber í sær, at verandi betonggarður á staðnum verður nýtt matrikulmark ístaðin fyri verandi, sum á matrikulkortinum er víst sum ein óskilgreinað bogað linja.

Í máli 26/00261 (reinsan av innilokaðum áum) upplýsir spillivatnssamskiparin, at Vágsáin liggur í eini lokarennu sunnanfyri garðin.

**Burðardygd og heimsmálini:**
Nr. 11 – Burðardyggir býir og býlingar

**Lógargrundarlag:**
Kommunufulltrúin
Matrikullógin

Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Føroyar . Tlf. 410000

Almenna Byggisamtyktin

**Fíggjarligar avleiðingar:**
-

**Tilmæli:**
Vísandi til omanfyrinevnda, hevur Tekniska Fyrisiting hesar viðmerkingar í samband við viðmæli av málinum:

- at lendið millum verandi mark og betonggarðin (uml. 14 $m^2$) verður selt fyri kommununnar fasta snøklaprís
- at kommunan ongar útreiðslur hevur av ummatrikulering ella øðrum í samband við umskipanina
- at umskipanin á ongan hátt kemur at forða fyri møguligum arbeiði uppá ánna hinumegin garðin.

**Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 18. mai 2026:**
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 07-05-2026, men mælir til bíða við at avgreiða málið, til málið um lokarennuna er avgreitt.

**Tekniska Nevnd 20. mai 2026:**
Nevndin tekur undir við UBN 18-05-2026.

**Fíggjarnevndin 26. mai 2026:**
Nevndin tekur undir við TN 20-05-2026.

**Klaksvíkar Býráð 28. mai 2026:**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum frá umsitingini, dagf. 07-05-2026.

## 49/26
## 26/00572-2 Marknaumskipan millum matr.nr. 638 og 639 í Klaksvík

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin | 18.05.2026 | 65/26 |
| 2 Klaksvíkar Býráð | 28.05.2026 | 49/26 |

**26/00572-2 Marknaumskipan millum matr.nr. 638 og 639 í Klaksvík**

**Frágreiðing um málið:**
Í samband við umbygging av smiðjubygningi á matr.nr. 638 ynskja eigararnir av matr.nr. 638 og 639 at marknaumskipa uml. 4 $m^2$ frá matr.nr. 639 til 638.

**Burðardygd og heimsmálini:**
-

**Lógargrundarlag:**
Matrikullógin
Almenna Byggisamtyktin

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Ongar – kommunan ummælandi

**Tilmæli:**
Mælt verður til at viðmæla marknaumskipanini.

**Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 18. mai 2026:**
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 07-05-2026.

**Klaksvíkar Býráð 28. mai 2026:**
Tilmælið frá Umhvørvis- og Býarskipanarnevndindi 18. mai 2026 einmælt samtykt.

## 50/26
## 24/00244-22 Sundurbýti, marknaumskipan og byggisamtyktarbroyting í Ánunum - matr.nr. 33 og 28

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Ánanevndin | 12.05.2026 | 4/26 |
| 2 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin | 18.05.2026 | 68/26 |
| 3 Klaksvíkar Býráð | 28.05.2026 | 50/26 |

**24/00244-22 Sundurbýti, marknaumskipan og byggisamtyktarbroyting í Ánunum - matr.nr. 33 og 28**

**Frágreiðing um málið:**
31. okt. 2024 samtykkir Klaksvíkar Býráð at viðmæla umsókt sundurbýti og marknaumskipan í Ánunum, treytað av góðkenning av tí til ta kravdu byggisamtyktarbroyting.
Áðrenn tilgongdin við byggisamtyktarbroyting verður sett í gongd, ger umsøkjarin vart við, at málið sær út til at vera viðgjørt eftir skeivari umsókn, og boðar frá, at nýggj umsókn er latin Umhvørvisstovuni.
Í samráð við umsøkjaran verður málið lagt til viks, inntil nýggj umsókn er móttikin.
---
5. mars 2026 sendir Umhvørvisstovan kommununi røttu skjølini, sum við hesum verða løgd fyri nevndir og býráð.
Býarskipanarliga skuldu í fyrru umsóknini uml. 300 $m^2$ flytast frá trøðni (matr.nr. 33 í landbúnaðarøki) til A24 (blandað bygging). Henda víddin er í nýggju umsóknini broytt til uml. 522 $m^2$.
Matrikulert minkar matr.nr. 33 við uml. 1100 $m^2$, harav uml. 800 $m^2$ fara til sundurbýtta partin av matr.nr. 33 og uml. 300 $m^2$ til matr.nr. 28.

**Burðardygd og heimsmálini:**
-

**Lógargrundarlag:**
Matrikullógin
Almenna Byggisamtyktin fyri Klaksvíkar Kommunu

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Kommunan bert ummælandi

**Tilmæli:**
Tekniska Fyrisiting mælir til :

- at fara undir tilgongdina við broyting í byggisamtyktini viðvíkjandi regulering av økismarki millum A24 og G í Ánunum samsvarandi ætlaðum matrikulmarkum í umsókn til Umhvørvisstovuna dagf. 4. sept. 2025
- at viðmæla sundurbýti, treytað av, at byggisamtyktarbroytingin verður góðkend.

**Ánanevndin 12. mai 2026:**
Nevndin tekur undir við tilmæli frá Fyrisitingini dagf. 21-04-2026.

**Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 18. mai 2026:**
Nevndin tekur undir við Ánanevndini 12. mai 2026.

**Klaksvíkar Býráð 28. mai 2026:**
Tilmælið frá Umhvørvis- og Býarskipanarnevndindi 18. mai 2026 einmælt samtykt.

## 51/26
## 26/00180-2 Marknaumskipan, matr.nr. 11a og 11b á Trøllanesi

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Trøllanesnevndin | 11.05.2026 | 4/26 |
| 2 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin | 18.05.2026 | 67/26 |
| 3 Klaksvíkar Býráð | 28.05.2026 | 51/26 |

**26/00180-2 Marknaumskipan, matr.nr. 11a og 11b á Trøllanesi**

**Frágreiðing um málið:**
Umhvørvisstovan biður um kommununnar ummæli til marknaumskipan millum matr.nr. 11b og 11a á Trøllanesi. Lagt verður samstundis upp til tinglýsing av ferðslurætti yvir matr.nr. 11a til matr.nr. 11d sum víst á innsendu skjølum frá Búnaðarstovuni.

Tekniska Fyrisiting hevur hesar viðmerkingar til umsóknina:
Byggisamtyktarlig áseting: økispartur A28 – Blandað íbúðar- og vinnuendamál.
Matrikulviðurskifti: Vegurin, sum kommunan hevur yvirtikið omanfyri bygdina á Trøllanesi, hevur skilt ognina í tveir partar, soleiðis at hinumegin vegin liggur eitt restøki uppá 41 $m^2$, samstundis sum vegurin gjøgnum festijørðina hevur ført við sær, at eitt øki uppá 47 $m^2$ av festijørðini nú liggur millum vegin og sethúsaognina (matr. nr. 11b).
Við marknaumskipanini verður ruddað upp, soleiðis at nevndu restøkir verða løgd saman við ognunum, tey liggja uppat.

**Burðardygd og heimsmálini:**
-

**Lógargrundarlag:**
Matrikullógin

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Ongar – kommunan bert ummælandi

Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Føroyar . Tlf. 410000

**Tilmæli:**
Tekniska Fyrisiting mælir til at viðmæla umsóknini.

**Trøllanesnevndin 11. mai 2026:**
Nevndin umrøddi málið og mælir til, at UBN tekur støðu, av tí orsøk, at spurningur kann setast til gegnið hjá nevndarlimum.

**Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 18. mai 2026:**
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 21-04-2026.

**Klaksvíkar Býráð 28. mai 2026:**
Tilmælið frá Umhvørvis- og Býarskipanarnevndindi 18. mai 2026 einmælt samtykt.

## 52/26
## 24/00720-29 Trafostøð - lendisspurningur

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Trøllanesnevndin | 11.05.2026 | 3/26 |
| 2 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin | 18.05.2026 | 56/26 |
| 3 Fíggjarnevndin | 26.05.2026 | 61/26 |
| 4 Klaksvíkar Býráð | 28.05.2026 | 52/26 |

**24/00720-29 Trafostøð - lendisspurningur**

**Frágreiðing um málið:**
Í samband við viðgerðina um sundurbýti av matr.nr. 25 v.fl. á Trøllanesi samtykti Klaksvíkar Býráð á fundi 14. okt. 2024 at viðmæla umsóknini, samstundis sum greiða skuldi fáast á ognarviðurskiftunum uppá lendið undir trafostøðini, sum stendur á matr.nr. 25.

Í e-posti til kommununa, dagf. 3. mars 2026, svara eigararnir kommununi aftur, har teir samstundis vísa á nøkur uppskot til loysn. (sí viðheft)

**Burðardygd og heimsmálini:**
nr. 11

**Lógargrundarlag:**
Kommunufulltrúin
Matrikullógin

**Fíggjarligar avleiðingar:**
-

**Tilmæli:**
Tekniska Fyrisiting hevur umrøtt málið innanhýsis og skjýtur upp:
1. at kommunan bjóðar seg til at taka niður grótið framvið vegmarkinum sunnanfyri trafostøðina og javna lendið nakað niðan, so atkoman til kommunala vegin gerst farbar,
   ella í øðrum lagi

2. at samráðingar verða tiknar upp við eigaran norðanfyri um makaskifti/keyp av lendi av matr.nr. 24 norðanfyri trafostøðina, og KK afturfyri letur matr.nr. 24 gamla trafo-lendið (matr.nr. 13) mitt í matr.nr. 24 umframt eitt rímiligt "gottgerilsi" – t.d. sum asfaltering av parti av matr.nr. 24, ella í triðja lagi
3. at kanna hjá SEV, um teir hava ætlanir um aðra trafostøð í bygdini, og um henda so kann takast burtur ... (ella møguliga flytast á upprunaliga avtalaðu staðsetingina)

Mælt verður til at royna uppskot 1 fyrst.

**Trøllanesnevndin 11. mai 2026:**
Nevndin umrøddi málið og mælir til, at UBN tekur støðu av tí orsøk, at spurningur kann setast til gegnið hjá nevndarlimum.
Nevndin hevur hesar viðmerkingar:
Neyðugt er at fáa matrikuleru viðurskiftini við SEV-tornið upp á pláss. Eigara av matr.nr. 25a skriva ikki undir, fyrr enn málið um atkomuna til stykkið er samtykt.
Nevndin hevur onga einmælta niðurstøðu um veg sunnanfyri ella norðanfyri SEV-tornið.
Eigarin av matr.nr. 24 eri ímóti, at íbindingin verður gjørd norðanfyri.

**Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 18. mai 2026:**
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 05-05-2026, at byrja við uppskoti 1, og at umsitingin fær heimild til at kanna hinar báðar loysnirnar, um ikki uppskot 1 kann gjøgnumførast.

**Fíggjarnevndin 26. mai 2026:**
Nevndin tekur undir við UBN 18-05-2026.

**Klaksvíkar Býráð 28. mai 2026:**
Tilmælið frá Fíggjarnevndini 26. mai 2026 einmælt samtykt.

## 53/26
## 24/00923-10 Endurskoðan av byggisamtyktini fyri Syðradal og Húsar

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Húsanevndin | 11.05.2026 | 6/26 |
| 2 Syðradalsnevndin | 11.05.2026 | 4/26 |
| 3 Ferðslunevndin | 18.05.2026 | 28/26 |
| 4 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin | 18.05.2026 | 62/26 |
| 5 Mentanarnevndin | 19.05.2026 | 38/26 |
| 6 Trivnaðarnevndin Børn og Ung | 19.05.2026 | 24/26 |
| 7 Trivnaðarnevndin Eldri og Bústaðir | 19.05.2026 | 29/26 |
| 8 Havna- og Vinnunevndin | 20.05.2026 | 38/26 |
| 9 Tekniska Nevnd | 20.05.2026 | 44/26 |
| 10 Klaksvíkar Býráð | 28.05.2026 | 53/26 |

**24/00923-10 Endurskoðan av byggisamtyktini fyri Syðradal og Húsar**

**Frágreiðing um málið:**
Sum framhald av arbeiðinum at endurskoða byggisamtyktina fyri Syðradal og Húsar hevur arbeiðsdagur verið í feb. við staðbundnu fólkunum, har arbeitt hevur verið við uppskotinum til nýggja og dagførda byggisamtykt.

Viðmerkingar og uppskot frá arbeiðsdegnum eru lýst niðanfyri og tillagað í viðhefta byggisamtyktar-uppskoti.
Á arbeiðsfundunum komu eisini onnur viðurskiftir fram, sum eru viðkomandi fyri víðari planlegging av bygdunum og trivnaðinum.

**Syðradalur:**
- Regulering í byggiøkinum niðri á Bakkanum, men loyva bygging sunnan- og norðanfyri.
- Mæla til, at matr.nr. 99 á Bakkanum liggur uttanfyri byggisamtyktina, til ein ætlan fyriliggur.
- Komandi neystabygging á Bakkanum skal hóska seg til verandi økið/neyst.

Annað:
- Vegirnir í bygdini skulu ikki breiðkast.
- Komandi vegaføring eigur at byrja frá vegnum norðanfyri ferjuleguna, yvir neystunum, og suður til grundøkini á Bakkanum (gula linjan er vegleiðandi).



*Syðradal – Møg. linjuføring til veg*

**Húsar:**
- Nýtt bústaðaøki norðanfyri bygdina A44.
- Ynski er at halda barnagarðin Blómugarð í A-øki *(Blandað íbúðar- og vinnuøkið),* áður lá hann í C-øki *(Almenn endamál)*, um virksemið skuldi broytast.
- Regulering av mørkunum millum A-økini *(Blandað íbúðar- og vinnuøkið).*
- Leingja A43 við Kvíggjará norður.

Annað:
- Fyri at fáa ágóðan av byggilendinum omanfyri bygdina má ein vegaføring gerast, og hendan kundi verið løgd frá Kvíggjará og norður (gula linjan).
- Kvíggjará verður nógv vitjað góðveðursdagar, tað hevði verið upplagt at lagt eina gøtu niðan til ánna/hylin (reyða linjan).



*Húsar - Møg. linjuføring til veg og gøtu*

**Burðardygd og heimsmálini:**
Mál 11: Burðardyggir býir og býlingar

**Lógargrundarlag:**
Løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 82 frá 2. mai 2025

**Fíggjarligar avleiðingar:**
-

**Tilmæli:**
Mælt verður til at fremja lýstu byggisamtyktarbroyting.

**Húsanevndin 11. mai 2026:**
Nevndin tekur undir við tilmæli frá Fyrisitingini dagf. 05-05-2026.

**Syðradalsnevndin 11. mai 2026:**
Nevndin ynskir fund við Fyrisitingina, áðrenn málið fer víðari. Nevndin hevur annars ta viðmerking, at steinurin Huldutúvan kemur at hoyra til eitt fríøki, saman við minnisvarðanum.

**Ferðslunevndin 18. mai 2026:**
Nevndin tekur undir við Húsa- og Syðradalsnevndunum 11. mai 2026.

**Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 18. mai 2026:**
Nevndin tekur undir við FeN 18-05-2026.

**Mentanarnevndin 19. mai 2026:**
Nevndin tekur undir við UBN, dagf. 18-05-2026.

**Trivnaðarnevndin Børn og Ung 19. mai 2026:**
Nevndin tekur undir við MeN, dagfest 19-05-2026.

**Trivnaðarnevndin Eldri og Bústaðir 19. mai 2026:**
Nevndin tekur undir við TrN Børn og Ung, dagfest 19-05-2026.

**Havna- og Vinnunevndin 20. mai 2026:**
Nevndin tekur undir við TrN Eldri og Bústaðir, dagf. 19-05-2026

**Tekniska Nevnd 20. mai 2026:**
Nevndin tekur undir við HaVN 20-05-2026.

**Klaksvíkar Býráð 28. mai 2026:**
Tilmælið frá Teknisku Nevnd 20. mai 2026 einmælt samtykt.

## 54/26
## 26/00411-2 Uppískoytisstykki - matr.nr. 40, Svínoy - Búnaðarstovan

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Svínoyarnevndin | 13.05.2026 | 3/26 |
| 2 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin | 18.05.2026 | 66/26 |
| 3 Klaksvíkar Býráð | 28.05.2026 | 54/26 |

**26/00411-2 Uppískoytisstykki - matr.nr. 40, Svínoy - Búnaðarstovan**

**Frágreiðing um málið:**
Nú byggisamtyktin fyri Svínoy er góðkend, biður Búnaðarstovan av nýggjum um ummæli kommununnar til sølu burturav festijørðini matr.nr. 90a.

Talan er um tvey mál:
ár 2018: søkt verður um at frábýta lutin "Heimi á Bø 6 – vídd 382 $m^2$ " frá matr.nr. 90a (festijørðini), fyri síðani at selja frábýtta lutin til festaran.
ár 2021: eigarin av matr.nr. 40 (Heimi á Bø 8A og 8B, sum er grannaogn hjá matr.nr. 90a) søkja um at fáa til keyps uml. 64 $m^2$ av umrødda luti av matr.nr. 90a.

Málini eru fyrr viðgjørd av býráðnum – ávikavist í febr. 2019 og des. 2021. Tá hevði býráðið onga viðmerking til umsøktu sølu - tó treytað av, at møgulig broyting í nýtsluni verður í samsvar við ta til eina og hvørja tíð galdandi áseting í byggisamtyktini. – Samtykt var somuleiðis at lata upp til eigaran av lendinum (Búnaðarstovuna) at gera av, um lendið verður býtt millum áhugaðu keypararnar, tó við teirri viðmerking, at eftirverandi partur av lutinum av matr.nr. 90a (heimi á Bø 6) ikki verður minni enn 300 $m^2$, sum er minsta mark fyri grundøki sambært góðkendu byggisamtyktini.

**Burðardygd og heimsmálini:**
-

**Lógargrundarlag:**
Løgtingslóg nr. 64 frá 11. des. 1962 við seinni broytingum um matrikulering og sundurbýti v.m
Løgtingslóg nr. 45 frá 15. mai 2007 um landsjørð -við seinni broytingum
Almenna Byggisamtyktin fyri Klaksvíkar kommunu

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Ongar – kommuna bert ummælandi

**Tilmæli:**
Mælt verður til at halda fast við býráðssamtyktirnar frá febr. 2019 og des. 2021

**Svínoyarnevndin 13. mai 2026:**
Nevndin tekur undir við tilmæli frá Fyrisitingini dagf. 23-04-2025.

**Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 18. mai 2026:**
Nevndin tekur undir við Svínoyarnevndini 13. mai 2026.

**Klaksvíkar Býráð 28. mai 2026:**
Tilmælið frá Umhvørvis- og Býarskipanarnevndini 18. mai 2026 einmælt samtykt.

## 55/26
## 26/00022-39 Serflutningsskipanin, keyp av nýggjum bussi – *eykajáttan, fyrra viðgerð*

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Trivnaðarnevndin Eldri og Bústaðir | 19.05.2026 | 21/26 |
| 2 Fíggjarnevndin | 26.05.2026 | 51/26 |
| 3 Klaksvíkar Býráð | 28.05.2026 | 55/26 |
| 4 Klaksvíkar Býráð | 25.06.2026 | |

**26/00022-39 Serflutningsskipanin – keyp av nýggjum bussi - eykajáttan**

**Frágreiðing um málið:**
Seinastu mánaðirnar hevur verið arbeitt nógv við at útvega nøktandi fyribils loysnir fyri serflutningsbussin í inniverandi ári, soleiðis at íløgan í nýggjan buss kundi bíða til 2027.

Við støði í fleiri royndum, ið ikki bóru á mál, tók umsitingin málið upp við borgarstjóran og forkvinnuna í TrN E&B, og varð komið til ta niðurstøðu, at ein endalig loysn ikki kann bíða líka til komandi ár. Vísandi til hetta, tók borgarstjórin – í samráð við nevndarforkvinnuna – avgerð um at keypa nýggjan serflutningsbuss nú beinanvegin sambært teimum tilboðum, sum fyriliggja.

**Lógargrundarlag:**
Kommunustýrislógin ásetur, at ikki kann farast undir nakra útreiðslu, uttan at játtan til hesa fyriliggur.

Kommunustýrislógin hevur somuleiðis hesar ásetingar:
§ 21, *Stk. 3.* Borgarstjórin kann taka avgerð í málum, ið ikki tola at bíða ella har ongin orsøk er til iva.
§ 31, *Stk. 2.* Nevndarformaður kann taka avgerð í málum, ið ikki tola at bíða, ella har ongin orsøk er til iva. Tó skal borgarstjórin kunnast, áðrenn avgerð verður tikin í málum, ið ikki tola at bíða, uttan so er, at tað snýr seg um avgerðir, sum við lóg eru latnar nevndini.

**Fíggjarligar avleiðingar:**

| | Prísur u/mvg | v/kommunu-mvg |
|---|---|---|
| Keypskostnaður, nýggjur serflutningsbussur | 564.700 kr. | 599.993,75 kr. |
| Mettur søluprísur fyri gamla bussin | -100.000 kr. | -106.250,00 kr. |
| = Keypsprísur netto | 464.700 kr. | 493.743,75 kr. |

Tá ið verandi serflutningsbussur varð keyptur, varð hann skrásettur hjá Heiminum við Vágna.

Um sama mannagongd verður brúkt ísv. hetta keypið, sleppur kommunan heilt undan mvg.
Tvs. samlaður netto keypsprísur verður tá 464.700 kr.

Eingin avseting er í inniverandi fíggjarætlan til hetta keyp, sum tí krevur eina eykajáttan, um eingin flyting millum kontur letur seg gera.

**Tilmæli:**
Vísandi til omanfyristandandi, verður málið lagt fyri avvarðandi nevndir og býráðið við umbøn um eykajáttan í inniverandi ári á 464.700 kr. til keyp av nýggjum serflutningsbussi.

**Trivnaðarnevndin Eldri og Bústaðir 19. mai 2026:**
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagfest 11-05-2026.

**Fíggjarnevndin 26. mai 2026:**
Nevndin tekur undir við E&B 19-05-2026.

**Klaksvíkar Býráð 28. mai 2026:**
Tilmælið frá Fíggjarnevndini 26. mai 2026 einmælt samtykt.

## 56/26
## 26/00582-1 Øktur tørvur á heimahjálp (NBH) - *eykajáttan (KK), fyrra viðgerð*

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Trivnaðarnevndin Eldri og Bústaðir | 19.05.2026 | 22/26 |
| 2 Fíggjarnevndin | 26.05.2026 | 52/26 |
| 3 Klaksvíkar Býráð | 28.05.2026 | 56/26 |
| 4 Klaksvíkar Býráð | 25.06.2026 | |

**26/00582-1 Øktur tørvur á heimahjálp (NBH) - eykajáttan (KK)**

**Frágreiðing um málið:**
Leiðslan fyri Norðoya Bú- og Heimatænastu hevur sent Klaksvíkar kommunu fráboðan um hesar samtyktir í NBH, sum mugu viðgerast í KK:

1. *Øktur tørvur á heimahjálp – hetta er bráðneyðugt og er viðgjørt tvær ferðir í stýrinum. So uppgávan er helst bara at kunna um samtyktina.*
2. Bólkaleiðarar til Norðoya Røktarheim
3. Fígging av felags dagtilhaldi á Glyvrum
4. Flutningur til felags dagtilhaldið til yngri borgarar við demens – onnur viðgerð

Hetta tilmæli snýr seg um omanfyri nevnda *pkt. 1.*

**Lógargrundarlag:**
**Løgtingslóg nr. 20 frá 7. apríl 2014 um kommunalt samstarv um heimatænastu, eldrarøkt v.m.**

§ 7., stk. 8. Samstarvið kann ikki átaka sær nakra útreiðslu, uttan neyðug játtan er tøk. Stýrið kann tó, um neyðugt, veita eykajáttan. *Eykajáttan krevur tvær viðgerðir, har samstarvandi kommunurnar hava samtykt neyðuga eykajáttan millum 1. og 2. viðgerð av eykajáttanini hjá samstarvinum*.

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Verða lýstar í viðfesta samtyktarskjali.

Býtið av útreiðslunum millum kommunurnar sæst í talvuni niðanfyri:

| | Íbúgvar 67+ 31-12-2024 | Partur av útr. (%) | At gjalda |
|---|---|---|---|
| Fugloyar | 7 | 0,63 | 7.959 |
| Viðareiðis | 44 | 3,95 | 50.027 |
| Hvannasund | 80 | 7,18 | 90.959 |
| Klaksvíkar | 961 | 86,27 | 1.092.641 |
| Kunoyar | 22 | 1,97 | 25.014 |
| | **1114** | **100,00** | **1.266.600** |

**Tilmæli:**
Vísandi til omanfyristandandi og viðfesta samtyktarskjal frá NBH, verður málið lagt fyri avvarðandi nevndir og býráðið til viðgerðar.

**Trivnaðarnevndin Eldri og Bústaðir 19. mai 2026:**
Nevndin tekur kunningina til eftirtektar.

**Fíggjarnevndin 26. mai 2026:**
Nevndin tekur undir við NBH 7. mai 2026.

**Klaksvíkar Býráð 28. mai 2026:**
Tilmælið frá Fíggjarnevndini 26. mai 2026 einmælt samtykt, og at eykajáttanin verður fíggjað av *tøkum peningi.*

## 57/26
## 26/00583-1 Bólkaleiðarar til Norðoya Røktarheim (NBH) - *eykajáttan (KK), fyrra viðgerð*

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Trivnaðarnevndin Eldri og Bústaðir | 19.05.2026 | 23/26 |
| 2 Fíggjarnevndin | 26.05.2026 | 53/26 |
| 3 Klaksvíkar Býráð | 28.05.2026 | 57/26 |
| 4 Klaksvíkar Býráð | 25.06.2026 | |

**26/00583-1 Bólkaleiðarar til Norðoya Røktarheim (NBH) - eykajáttan (KK)**

**Frágreiðing um málið:**
Leiðslan fyri Norðoya Bú- og Heimatænastu hevur sent Klaksvíkar kommunu fráboðan um hesar samtyktir í NBH, sum mugu viðgerast í KK:

Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Føroyar . Tlf. 410000

1. Øktur tørvur á heimahjálp – hetta er bráðneyðugt og er viðgjørt tvær ferðir í stýrinum. So uppgávan er helst bara at kunna um samtyktina.
2. *Bólkaleiðarar til Norðoya Røktarheim*
3. Fígging av felags dagtilhaldi á Glyvrum
4. Flutningur til felags dagtilhaldið til yngri borgarar við demens – onnur viðgerð

Hetta tilmæli snýr seg um omanfyri nevnda *pkt. 2.*

**Lógargrundarlag:**
**Løgtingslóg nr. 20 frá 7. apríl 2014 um kommunalt samstarv um heimatænastu, eldrarøkt v.m.**
§ 7., stk. 8. Samstarvið kann ikki átaka sær nakra útreiðslu, uttan neyðug játtan er tøk. Stýrið kann tó, um neyðugt, veita eykajáttan. *Eykajáttan krevur tvær viðgerðir, har samstarvandi kommunurnar hava samtykt neyðuga eykajáttan millum 1. og 2. viðgerð av eykajáttanini hjá samstarvinum*.

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Verða lýstar í viðfesta samtyktarskjali.

Býtið av meirútreiðslunum, síggjast í talvuni niðanfyri:

| | Íbúgvar 67+ 31-12-2024 | Partur av útr. (%) | At gjalda |
|---|---|---|---|
| Fugloyar | 7 | 0,63 | 2.170 |
| Viðareiðis | 44 | 3,95 | 13.641 |
| Hvannasund | 80 | 7,18 | 24.803 |
| Klaksvíkar | 961 | 86,27 | 297.940 |
| Kunoyar | 22 | 1,97 | 6.821 |
| | **1114** | **100,00** | **345.375** |

**Tilmæli:**
Vísandi til omanfyristandandi og viðfesta samtyktarskjal frá NBH, verður málið lagt fyri avvarðandi nevndir og býráðið til viðgerðar.

**Trivnaðarnevndin Eldri og Bústaðir 19. mai 2026:**
Nevndi tekur kunningina til eftirtektar.

**Fíggjarnevndin 26. mai 2026:**
Nevndin tekur undir við NBH 7. mai 2026

**Klaksvíkar Býráð 28. mai 2026:**
Tilmælið frá Fíggjarnevndini 26. mai 2026 einmælt samtykt, og at eykajáttanin verður fíggjað av *tøkum peningi.*

## 58/26
## 26/00584-1 Fígging av felags dagtilhaldi á Glyvrum fyri demenssjúk (NBH) - *eykajáttan (KK), fyrra viðgerð*

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Trivnaðarnevndin Eldri og Bústaðir | 19.05.2026 | 24/26 |
| 2 Fíggjarnevndin | 26.05.2026 | 54/26 |
| 3 Klaksvíkar Býráð | 28.05.2026 | 58/26 |
| 4 Klaksvíkar Býráð | 25.06.2026 | |

**26/00584-1 Fígging av felags dagtilhaldi á Glyvrum fyri demenssjúk (NBH) - eykajáttan (KK)**

**Frágreiðing um málið:**
Leiðslan fyri Norðoya Bú- og Heimatænastu hevur sent Klaksvíkar kommunu fráboðan um hesar samtyktir í NBH, sum mugu viðgerast í KK:

1. Øktur tørvur á heimahjálp – hetta er bráðneyðugt og er viðgjørt tvær ferðir í stýrinum. So uppgávan er helst bara at kunna um samtyktina.
2. Bólkaleiðarar til Norðoya Røktarheim
3. *Fígging av felags dagtilhaldi á Glyvrum*
4. Flutningur til felags dagtilhaldið til yngri borgarar við demens – onnur viðgerð

Hetta tilmæli snýr seg um omanfyri nevnda *pkt. 3.*

**Lógargrundarlag:**
**Løgtingslóg nr. 20 frá 7. apríl 2014 um kommunalt samstarv um heimatænastu, eldrarøkt v.m.**
§ 7., stk. 8. Samstarvið kann ikki átaka sær nakra útreiðslu, uttan neyðug játtan er tøk. Stýrið kann tó, um neyðugt, veita eykajáttan. *Eykajáttan krevur tvær viðgerðir, har samstarvandi kommunurnar hava samtykt neyðuga eykajáttan millum 1. og 2. viðgerð av eykajáttanini hjá samstarvinum*.

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Verða lýstar í viðfesta samtyktarskjali.

parturin hjá NBH, býttur millum kommunurnar í Norðoyggjum:

| FÆ2026, dagt. á Glyvrum | Íbúgvar 01-11-2025 | Partur av útr. (%) | At gjalda | Íroknað væntaðar inntøkur |
|---|---|---|---|---|
| Fugloyar | 48 | 0,74 | 6.216 | 6.153 |
| Viðareiðis | 329 | 5,08 | 42.607 | 42.172 |
| Hvannasund | 426 | 6,58 | 55.168 | 54.606 |
| Klaksvíkar | 5.523 | 85,30 | 715.247 | 707.949 |
| Kunoyar | 149 | 2,30 | 19.296 | 19.099 |
| | **6.475** | **100,00** | **838.534** | **829.979** |

**Tilmæli:**
Vísandi til omanfyristandandi og viðfesta samtyktarskjal frá NBH, verður málið lagt fyri avvarðandi nevndir og býráðið til viðgerðar.

**Trivnaðarnevndin Eldri og Bústaðir 19. mai 2026:**
Nevndin tekur kunningina til eftirtektar.

**Fíggjarnevndin 26. mai 2026:**
Nevndin tekur undir við NBH 7. mai 2026.

**Klaksvíkar Býráð 28. mai 2026:**
Tilmælið frá Fíggjarnevndini 26. mai 2026 einmælt samtykt, og at eykajáttanin verður fíggjað av *tøkum peningi.*

## 59/26
## 26/00585-1 Flutningur til felags dagtilhaldið á Glyvrum til yngri borgarar við demensi (NBH) - *eykajáttan (KK), fyrra viðgerð*

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Trivnaðarnevndin Eldri og Bústaðir | 19.05.2026 | 25/26 |
| 2 Fíggjarnevndin | 26.05.2026 | 55/26 |
| 3 Klaksvíkar Býráð | 28.05.2026 | 59/26 |
| 4 Klaksvíkar Býráð | 25.06.2026 | |

**26/00585-1 Flutningur til felags dagtilhaldið á Glyvrum til yngri borgarar við demensi (NBH) - eykajáttan (KK)**

**Frágreiðing um málið:**
Leiðslan fyri Norðoya Bú- og Heimatænastu hevur sent Klaksvíkar kommunu fráboðan um hesar samtyktir í NBH, sum mugu viðgerast í KK:

1. Øktur tørvur á heimahjálp – hetta er bráðneyðugt og er viðgjørt tvær ferðir í stýrinum. So uppgávan er helst bara at kunna um samtyktina.
2. Bólkaleiðarar til Norðoya Røktarheim
3. Fígging av felags dagtilhaldi á Glyvrum
4. *Flutningur til felags dagtilhaldið til yngri borgarar við demens – onnur viðgerð*

Hetta tilmæli snýr seg um omanfyri nevnda *pkt. 4.*

**Lógargrundarlag:**
**Løgtingslóg nr. 20 frá 7. apríl 2014 um kommunalt samstarv um heimatænastu, eldrarøkt v.m.**
§ 7., stk. 8. Samstarvið kann ikki átaka sær nakra útreiðslu, uttan neyðug játtan er tøk. Stýrið kann tó, um neyðugt, veita eykajáttan. *Eykajáttan krevur tvær viðgerðir, har samstarvandi kommunurnar hava samtykt neyðuga eykajáttan millum 1. og 2. viðgerð av eykajáttanini hjá samstarvinum*.

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Verða lýstar í viðfesta samtyktarskjali.

Niðanfyri sæst býtið av útreiðslum hjá kommununum. Gev gætur, at talan er um borgarar í øllum aldri og ikki yvir 67 ár.

| | Íbúgvar 01-11-2025 | Partur av útr. (%) | At gjalda |
|---|---|---|---|
| Fugloyar | 48 | 0,74 | 2.002 |
| Viðareiðis | 329 | 5,08 | 13.719 |
| Hvannasund | 426 | 6,58 | 17.764 |
| Klaksvíkar | 5.523 | 85,30 | 230.303 |
| Kunoyar | 149 | 2,30 | 6.213 |
| | **6.475** | **100,00** | **270.000** |

**Tilmæli:**
Vísandi til omanfyristandandi og viðfesta samtyktarskjal frá NBH, verður málið lagt fyri avvarðandi nevndir og býráðið til viðgerðar.

**Trivnaðarnevndin Eldri og Bústaðir 19. mai 2026:**
Nevndin tekur kunningina til eftirtektar.

**Fíggjarnevndin 26. mai 2026:**
Nevndin tekur undir við NBH 7. mai 2026.

**Klaksvíkar Býráð 28. mai 2026:**
Tilmælið frá Fíggjarnevndini 26. mai 2026 einmælt samtykt, og at eykajáttanin verður fíggjað av *tøkum peningi.*

## 60/26
## 26/00013-4 Vegir, íløgur í 2026 - *eykajáttan, seinna viðgerð*

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska Nevnd | 22.04.2026 | 35/26 |
| 2 Fíggjarnevndin | 28.04.2026 | 42/26 |
| 3 Klaksvíkar Býráð | 30.04.2026 | 32/26 |
| 4 Klaksvíkar Býráð | 28.05.2026 | 60/26 |

**26/00013-4 Vegir - íløgur í 2026**

**Frágreiðing um málið:**
Málið varð fyrru ferð samtykt av býráðnum 30. apríl 2026.

**Burðardygd og heimsmálini:**
At fremja gongubreytir, gongugeilar, koyrivegir og parkeringspláss í einum samfelag, har tørvur er, hevur stóran týdning, og stuðla hesi átøk/verkætlanir væl undir heimsmál fyri burðardyggari menning, t.d. mál nr. 11, at gera býir og búsetingar inkluderandi, trygg, dygg og burðardygg.

**Lógargrundarlag:**
Kommunufulltrúin og aðrar vegareglur, sum Klaksvíkar Býráð hevur gjørt galdandi fyri kommununa, m.a. við samtyktu byggisamtyktini.

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Óbrúkti peningurin til parkeringsplássið í Árnafirði kemur illa við hjá Tekniska økinum (2025), tí í rokni-stykkinum omanfyri er sett av av nýggjum. Ein framflyting av óbrúktari játtan hevði komið sera væl við, og tí verður málið sent Fíggjarnevndini og Býráðnum til viðgerðar, tá talan kann gerast um eina framflyting av játtan.

**Tilmæli:**
Við hesum verður málið sent nevndini til umrøðu/støðutakan. Tekniska Fyrisiting viðmælir:

- At 900 tkr. av óbrúktari játtan í 2025 til parkeringspláss og hús í Árnafirði verður framflutt til fíggjarætlanina fyri 2026. Málið krevur tvær býráðsviðgerðir.
- At restupphæddin 2,0 mió. kr. (ella 2,9 mió. kr. við framflyting) verða býttar millum ætlaða arbeiðið í Biskupsstøðgøtu og Nólsoyar Pálsgøtu.

**Tekniska Nevnd 22. apríl 2026:**
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 10-04-2026.

**Fíggjarnevndin 28. apríl 2026:**
Nevndin tekur undir við TN 22-04-2026, og staðfestir, at talan er um eykajáttan.

**Klaksvíkar Býráð 30. apríl 2026:**
Tilmælið frá Fíggjarnevndini 28-04-2026 einmælt samtykt. Eykajáttanin verður at fíggja av *tøkum peningi.*

**Klaksvíkar Býráð 28. mai 2026:**
Tilmælið frá Klaksvíkar Býráð 30. apríl 2026 einmælt samtykt við seinnu viðgerð.

## 61/26
## 26/00504-1 Sprotin, nýtt rakstrarstað, útreiðsluneutral flyting millum kontur - *eykajáttan, seinna viðgerð*

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 28.04.2026 | 34/26 |
| 2 Klaksvíkar Býráð | 30.04.2026 | 36/26 |
| 3 Klaksvíkar Býráð | 28.05.2026 | 61/26 |

**26/00504-1 Sprotin, nýtt rakstrarstað - útreiðsluneutral flyting millum kontur (eykajáttan 2026)**

**Frágreiðing um málið:**
Málið varð fyrru ferð samtykt av býráðnum 30. apríl 2026.

**Burðardygd og heimsmálini:**
-

**Lógargrundarlag:**
Kunngerð um roknskaparverk kommunanna o.tíl frá 5. okt 2008.
Lógarheimildin er í § 47 í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri (kommunustýrislógin)

Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Føroyar . Tlf. 410000

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Broytingin er útreiðsluneutral – hevur ongar fíggjarliga avleiðingar fyri kommununa.

**Tilmæli:**
Vísandi til avgerðina hjá Føroya Gjaldstovu og kunngerð um roknskaparverk kommunanna o.tíl frá 5. okt 2008 verður mælt til, at kommunan tekur undir við, at orðabókin Sprotin frá 1. januar 2026 verður staðsett undir § 5.
Mælt verður eisini til, at rakstrarstaðið verður lagt undir Mentanarnevndina.

**Fíggjarnevndin 28. apríl 2026:**
Tilmælið, dagf. 21-04-2026, einmælt samtykt.

**Klaksvíkar Býráð 30. apríl 2026:**
Tilmælið frá Fíggjarnevndini 28-04-2026 einmælt samtykt.

**Klaksvíkar Býráð 28. mai 2026:**
Tilmælið frá Klaksvíkar Býráð 30. apríl 2026 einmælt samtykt við seinnu viðgerð.

**FRAMMANFYRI STANDANDI MÁL ERU VIÐGJØRD Á ALMENNUM FUNDI**

## 62/26
## 22/01821-40 Uppsøgn av sáttmála

## 63/26
## 25/01329-8 Stuðul til verkætlan

## 64/26
## 25/00750-29 Útboð

## 65/26
## 26/00452-4 Víðarisøla

*Fundurin lokin kl. 22.05*